## Nógv minni svartkjaftur næsta ár



Føroyar, Ísland, Norra, ES og Russland samráðast í dag um, hvussu svartkjafturin í Norðuratlantshavi skal býtast. Samráðingarnar, sum fara fram í London, byrjaðu í gjár, og eitt úrslit skal finnast í dag. Heildarkvotan av svartkjafti er 1,7 milliónir tons, umframt 137.000 tons til Rusland í altjóða sjógvi. Føroyski parturin av heildarkvotuni er góð 26 prosent. Tá strandalondini og Russland á sinni samdust um býtið av svartkjaftinum í Norðuratlantshavi, varð avtalað, at heildarkvotan í minsta lagi skuldi minka 100.000 tons um árið. Strandalondini ásanna, at svartkjaftafiskiskapurin er ov stórur. Í fjør var samlaði niðurskurðurin 300.000 tons, og niðurskurðurin í ár má í øllum føri vera tann sami, sigur Kate Sanderson, føroyskur samráðingarleiðari. - Tilgongdin til stovnin er ikki nóg góð, og tí er neyðugt at skerja veiðuna munandi, sigur Kate Sanderson. Men enn eru strandalondini ikki samd um, hvussu nógv svartkjaftafiskiskapurin skal skerjast næsta ár. Londini samráðast einans um, hvussu stór heildarkvotan skal vera. Býtislykilin er fastlæstur og ikki partur av samráðingunum. Føroyski samráðingarleiðarin hevur vónir um, at strandalondini koma til eina semju seinni í dag. Hósdagin og fríggjadagin er fundur í London um norðhavssildina. Og í næstu viku eru samráðingar í Oslo um makrelin.

# rið bangin



*ð ein fastur táttur í hennara gerandisdegi*



*- Tað verður avmarkað, hvørja gleði, eg fái av Hovstunlinum, tí nú eri komin so væl til árs, men hon verður ein fantastiskur lætti hjá teimum, sum eftir okkum koma, sigur Jonhild Bech*

norðanfyri skarðið á Hovsegg, var so vánaligt síni, at maskinførarin í gravimaskinuni kom út at spyrja okkum um vit vistu, hvar vit vóru stødd nú, tí eisini hann hevði mist orienteringina og visti ikki akkurát, hvar hann var staddur.

Jonhild sigur, at ta ferðina var so nógv rok, at tað reyk í aftur, so hvørt, sum grivið varð.

- Tí gjørdu vit at av venda við og so fóru vit oman til Øravíkar, har vit settu upp.

Har vóru tey í nakrar tímar, tá hevði hann makað veðrið nakað og so løgdu tey á aftur, og tá komu tey fram til húsar í øllum góðum.

- Men tað var bara suður til Þorkeris at venda, tí eg skuldi aftur til arbeiðis og fór so avstað aftur norður á Tvøroyri seinni um dagin.

### Tordu ikki at koyra

Ein túrur, hon minnist serliga væl, var í einum stormi eina náttina mitt í áttatiárunum.

- Tað var so nógvur vindur, at stóra skipið, Cockrow, varð tikið av hvirlum og fór á land í Trongisvági.

- Arbeiðsdagurin var liðugur beint fyri midnátt eftir ein kvøldvakt, men tað var kolandi stormur og streymurin var farin, so tað var eisini bølamyrkt. Eg hevði ein starvsfelaga við mær, sum ikki tordi at koyra sjálv, men vindurin var so nógvur, at eg hættaði mær ikki á fjøllini beinanvegin. Tískil bíðaðu vit eina løtu til eg helt, at hann hevði makað vindin og so hildu vit avstað aftur. Tað var eitt øgiligt trýst á bilin alla tíðina av vindinum, men sum allar hinar ferðirnar, gekk eisini hendan ferðin væl.

Jonhild sigur, at sjálvandi er torført at koyra í stormi og kavaroki. Men tað ringasta heldur hon vera at koyra í mjørka, sum ofta liggur so kavsvartur um Hovseggina.

Serliga hesi seinastu árini, tað eru blivnir fleiri og fleiri lastbilar og treylarar, hevur mjørkin verið ein stórur trupulleiki.

- Tað kann vera sera torført, tí møta vit so einum lastbili, mugu vit bakka til eitt víkipláss, tí vegurin hevur bara eitt spor. Og tað var mangan lættari sagt enn gjørt, tí ofta vóru fleiri bilar í hølunum í hvørjum øðrum og tað kundi elva til, at tað typtust, tí øll eru ikki líka køn og álvulig í at bakka í vánaligum umstøðum.

Ta einu ferðina, tað var myrkt og harafturat so svart í mjørka, at tað sást ikki fram um nøsina, noyddist Jonhild brádliga at bremsa á Eggini, tí ein bilur stóð frammanfyri henni mitt á vegnum.

- Tað vóru nakrir ungir mans norðaneftir, sum rætt og slætt høvdu steðgað bilinum mitt á vegnum, tí teir tordu ikki at koyra longur og tað var so svart í mjørka, at teir høvdu ikki ánilsi av, hvar teir vóru.

- Eg fór so inn á eitt víkipláss og vegleiddu teir í at koyra víðari, so eisini tað spældi væl av.

### Ikki veður hjá konufólki

Hon sigur, at bara einaferðina øll hesi árini hevur hon avlýst at fara til arbeiðis, tí tað var útideyðaveður.

- Eg skuldi á kvøldvakt, men tað var sovorðið kavarok, at eg helt, at eg skuldi bara fara við Bygdaleiðum, tí eg helt, at tað vóru óráð at koyra og Landsverk var eisini í ferð við at stongja vegin, tí veðrið var so ringt.

Men bussurin kom heldur ikki oman til Þorkeris, tí hann var fullur av fólki frammanundan.

- Eg ringdi so til bussføraran, men hann helt ikki, at tað vóru líkindi hjá konufólki at fara á fjøllini hendan dagin.

Ein annar trupulleiki, sum av og á hevur gjørt tað torført at koyra á gamla Hovsvegnum, er skalvalop.

- Einaferð fyri nøkrum fáum árum síðani leyp ein stórur skalvur oman á vegin á Hovseggini og tá varð vegurin stongdur í einar fimm dagar, so ta ferðina lá eg veðurføst alla hesa tíðina. Ímeðan veðurin varð stongdur, varð Smyril settur í sigling ímillum Vág og Tvøroyri.

Eina aðru ferð leyp aftur skalvur á vegin, men hann var ikki størri enn so, enn at tað tók ikki meiri enn nakrar tímar at grava vegin aftur.

- Tá var onki at gera, uttan at venda við og tá fóru vit oman til Hovs at fáa okkum ein kaffimunn.

Men hóast nógvir túrar hava verið fúlir, hava tað sanniliga eisini verið nógvir fantastiska vakrir túrar í dýrdarveðri, bæði í sól um dagarnar og í mánalýsi um næturnar, sigur Jonhild.

### Ein øgiligur lætti

Hon fegnast sostatt almikið um, at Hovstunnilin nú er komin.

- Eg fari kanska ikki so nógva gleði av tunlinum, tí nú eri eg komin upp í árini, at tað verður avmarkað, hvussu leingi eg brúki hana afturat - í arbeiðsørindum í øllum førum. Men hann verður ein øgiligur lætti hjá teimum, sum eftir okkum koma.

Jonhild Bech ivast ikki í, at tunnilin fer at binda Suðuroynna meiri saman og at styrkja samanhaldið í oynni.

- Tað eru mong, sum hveppa seg við at koyra um Hovsegg ella sum rætt og slætt ikki tora at koyra, tá ið ivalíkindi eru, so hetta vegastrekkið hevur tarnað nógvum fólki at liva og virka, sum tey vilja. Tí væntar hon eisini, at tað fer at vera meiri koyring ímillum syðru og norðaru helvt í oynni, enn tað hevur verið.

- Nú er bara at koyra fram eftir sløttum allan vegin og tað mesta av farleiðini er heilt niðri við sjógvin, so tað sparir uttan iva eisini nógv brennievni. Nú er vegurin eisini tveybreytaður allan vegin, so tað slepst undan at halda av í heilum.

- Sostatt er Hovstunnilin eitt ógvuliga stórt framstig, sum fer at gera tað nógv lættari og nógv skjótari at koma fram, sigur Jonhild Bech.